# Fríggjadagur 15. juli


Bogi Kristiansen spennir seg út í býarsúkklingini


Cecil Weihe rann hálvt maraton fríggjamorgunin, fleyg til Føroya fríggjakvøld og vann Tórshavn Maraton leygardag


Fótbóltskvinnurnar fegnast um gullsigurin


Thomas Rasmussen umboðaði fyri fyrstu ferð Føroyar á Oyggjaleikum, og hann gjørdi bart í einmansleikinum, sum hann vann


Aksel Poulsen tapir finaluna, men vinnur silvur í badminton


Fjølmiðlafólkini, sum dekkaðu Oyggjaleikirnar, hildu til á einari skjótibreyt á loftinum í Clickimin ítróttardeplinum

FØROYSKU rennararnir standa seg einki serligt í hálvum maraton. Guttorm Sørensen er fremsti føroyski rennarin og endar nummar 10.

RÓGVI HØJGAARD verður nummar 8 í kappingini spjótkasti, og Bogi Lenvig verður nummar 6 í 1500 metra renningini.

SKJÚTTARNIR Regin Enghamar og Bogi Wardum enda ávíkavist sum nummar 15 og 16 í einstaklingakappingini í trapskjóting.

AKSEL POULSEN tapir finaluna í einmansleikinum íbadminton fyri grønlendska Bror Madsen. Aksel hevur í løtum gott tak á grønlendska spælaranum, men ger ov nógv mistøk og tapir 2-0. Ragnar Rasmussen vinnur bronsu í somu kapping.

BOGI Kristiansen er besti føroyski súkklarin í býarkoyringini, men honum eydnast ikki at vinna heiðursmerki. Hann endar nummar 6, meðan Gunnar Dahl-Olsen dettir og má gevast.

TAÐ ENDAR við einum knúsandi stórsigri, tá ið føroysku fótbóltskvinnurnar spæla seinasta og avgerandi dystin á Oyggjaleikunum. Føroysku kvinnurnar vinna heili 12-0, og Rannvá Andreassen er besti málskjúttin fimm málum. Harvið vinna fótbóltskvinnurnar triðja gullmerkið á rað á Oyggjaleikum.

HØGNI R. ØSTER vinnur gull í seinastu fimleikakappingini á Oyggjaleikunum. Hann vinnur í lopi. Helgi Winter Olsen fær silvur á gólvinum og bronsu samanlagt í bundnu íðkanunum.

THOMAS RASMUSSEN vinna gull í einmansleikinum í borðtennis. Tað er fyrstu ferð, at føroyskur borðtennisspælari vinnur gull á Oyggjaleikum. Kjartan Eli Hentze fær bronsu í einmansleikinum, og saman fáa teir báðir bronsu í tvímansleikinum.

ENDAHÁTÍÐIN á Oyggjaleikunum er á Gilbertson leikvøllinum, men tað er mest sum uttan føroyska luttøku, tí teir allarflestu føroysku luttakararnir eru á veg til flogvøllin í Sumburgh, har flogførini flúgva til Føroya longu fríggjakvøldið.